

# Skrivari/fulltrúi á Sendistovu Føroya til ES í Brússel

***Vit sóknast eftir dugnaligum og nærlagdum fólki at gerast fastur partur av føroyska starvsliðnum í Brússel.***

**Starvið**
Søkt verður við hesum eftir skrivara/fulltrúa á sendistovu Føroya til Evropasamveldinum (Brússel) frá 1. september 2015 at rokna. Sendistovan røkir føroysk áhugamál í Evropasamveldinum. Skipanarliga er sendistovan og uttanríkistænastan á Løgmansskrivstovuni ein og sami myndugleiki.

**Uppgávur**
Tann, ið sett/ur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni. Sendikvinnan leiðir sendistovuna og er diplomatiska umboð Føroya til ES. Umframt skrivaran/fulltrúan er vanliga ein starvslesandi knýttur at sendistovuni.

Starvið fevnir millum annað um telefonmóttøku, bókhald, skjalaskráseting, skrivligt samskifti, innkeyp av skrivstovuútgerð og annan dagligan rakstur av sendistovuni, umframt praktiska samskipan av tiltøkum og vitjanum. Í stuttum skal viðkomandi ganga leiðaranum á Sendistovuni til handa í øllum dagligum virksemi. Stundum verður talan um at luttaka vegna Sendikvinnuna á fundum og tiltøkum eftir tørvi og at skriva frágreiðingar og annað kunnandi tilfar í hesum sambandi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hóskandi útbúgving á minsta lagi bachelorstigi. Dentur verður lagdur á viðkomandi praktiskar arbeiðsroyndir og góðan málkunnleika, bæði í skrift og talu, serliga føroyskt og enskt. Kunnleiki til høvuðsmálini í Belgia, franskt og/ella flamskt/hollendskt er ein fyrimunur. Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevnir, vera nærlagdir, hjálpsamir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður Sendistova Føroya til Evropasamveldið, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv og er skipað samsvarandi teim reglum, sum eru galdandi í donsku uttanríkistænastuni fyri lokalt sett starvsfólk. Útreiðslur í sambandi við flyting, eins og bústaðarviðurskifti annars, eru ábyrgd umsøkjarans. Sendistovan er til reiðar, eftir førimuni, at veita ráð um praktisk viðurskifti á staðnum.

**Nærri kunning um starvið**
Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kate Sanderson, sendikvinnu í Brússel, á telefon (+32) 2 280 04 78 ella (+32) 477 250 160 (fartelefon) ella telduposti kates@tinganes.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívrensli eiga at verða sendar til:

Løgmansskrivstovan,
Postrúm 64, Tinganes,
110 Tórshavn
ella við telduposti til: info@tinganes.fo.

Umsóknir skulu verða Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 17. apríl 2015**.

---

**Løgmansskrivstovan** er fyrisiting løgmans.
Løgmansskrivstovan tænir løgmanni í at skipa landsstýrisarbeiðið og hevur ábyrgdina av at fyrireika, fremja og hava eftirlit við teimum uppgávum, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini. Tær eru samskipan og fyrisiting. Løgmaður fyrisitur eisini uttanríkismál og lógarmál

**Uttanríkistænastan** situr fyri uttanlandsmálum so sum altjóðarætti, havrætti, handilsviðurskiftum, trygdarmálum, millumlandasamtarvi um havtilfeingi og burðardygga menning, økisbundnum samstarvi íroknað norðurlandamál, tjóðarbranding, menningarsamstarvi, útflutningsframa og konsularviðurskiftum. Harafturat varðar hon av limaskapum í fleir- og millumtjóðafelagsskapum sum IMO, FAO, UNESCO, NEAFC, NAFO, NASCO, IWC, NAMMCO og Arktiska Ráðnum. Føroyar hava sendistovur í Brússel, London, Reykjavík, Keypmannahavn og Moskva.

Serstøk mál hjá **Sendistovuni í Brússel** fevna um:
•at umboða Føroyar mótvegis Evropasamveldinum • í samstarvi við uttanríkistænastuna og avvarðandi stjórnarráð/stovn at varða av sáttmálum Føroya við ES, t.e. sáttmálar um handils-, heilsufrøðilig-, fiskivinnumál eins og granskingarmál •at fylgja við ES málum, ið kunnu hava týdning og avleiðingar fyri Føroyar • at røkja atlimaskap Føroya í matvørufelagsskapi Sameindu Tjóða (FAO) • at arbeiða fyri at gera Føroyar sjónligari á evropeiska meginlandinum • at veita tænastur til vinnufyritøkur